# Stóran týdning fyri samstarvið ímillum Føroyar og Danmark

**– Fundir, sum teir, vit høvdu í Suðuroy mánadagin, hava sera stóran týdning, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður**

SAMSTARVSFUNDUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Danska-føroyska ferðalagið á vegnum í Sandvík, har tey vóru og hugdu eftir gomlu, friðaðu bóndahúsununum í bygdini. Tað er berandi fyri forstáilsi ímillum Føroyar og Danmark, sigur Edmund Joensen*

– Hetta er ein berandi táttur í samstarvinum ímillum Føroya og Danmark.

So stóran týdning heldur Edmund Joensen, løgtingsformaður, at fundurin, sum var í Suðuroy mánadagin ímillum formansskapin í danska fólkatinginum og formanskapin í Føroya Løgtingi, hevur.

Fundur er ímillum formansskapirnar báðar einaferð um árið, annaðhvørt ár í Føroyum og annaðhvørt ár í Danmark.

– Hetta eru fundir, sum vit fáa sera nógv burturúr, tí á hesum fundum kunna vit hvønn annan um tað, sum er farið fram í farna árið og um tað, sum fer fram í løtuni og um tær ætlanir vit hava í næstu framtíð.

– Sostatt fáa vit kunnað hvønn annan um alt, sum rørir seg á politiska økinum í Danmark og í Føroyum, sigur Ednumd Joensen.

Hann sigur, at hetta er sera týdningarmikið fyri samstarvið í ríkisfelagsskapinum, ikki minst tí at allir teir stóru flokkarnir eru umboðaðir í formansskapinum.

– Saman við árliga ríkisfundinum og fundunum ímillum uttanlandsnevndina hjá Løgtingium og Føroyanevndina hjá løgtinginum, eru hesir fundirnir berandi fyri forstáilsi ímillum Føroyar og Danmark.

– Sostatt er tað eitt sera umfatandi samstarv, sum hevur tikið seg upp ímillum partarnar í ríkisfelagsskapinum, leggur hann afturat.

## Skilja hvønn annan betur

Hann sigur at á fundinum kunnaðir formansskapurin í Løgtinginum donsku starvsfelagarnir um fíggjarligu og vinnuligu støðuna í Føroyum og um tær lógir, sum eru samtyktar og sum hava við ríkisfelagsskapin at gera.

Hinvegin kunnaði danski formansskapurin føroyingar um broytingarnar í kommunuskipanini í Danmark.

– Hetta eru ikki politiskar viðgerðir, men einans ein kunning um tað, sum farið er og um tær ætlanir, sum eru frammi.

Edmund Joensen sigur, at endamálið við hesum fundinum er sostatt, at partarnir skulu skilja hvønn annan betur.

Løgtingsformaðurin sigur, at í hesum sambandi hevur tað ein serligan týdning ferðalagið ferðast runt í landinum og sær býir og bygdir, vegir og tunlar, vinnulív og mentan og heilsar upp á bý- og bygdaráð, tí tað gevur teimum serligar fortreytir fyri at skilja tað, sum fer fram og eru nógv betri førir fyri at taka støðu til tey mál, sum eru frammi og sum hava við ríkisfelagsskapin at gera.

Formanskapurin hjá danska fólkatinginum kom til Føroyar fríggjakvøldið og leygarmorgunin var so farið til Suðuroyar, har donsku gestirnir fingu jóansøkuna við. À jóansøku vóru tey í kirkju. Tað hevur uttan iva havt serligan týdning fyri formann fólkatingsins, Christian Mejdahl, ið er prestasonur á Tvøroyri, her hann búði tey fyrstu árini av lívi sínum. Tey hugdu eisini eftir kappróðuri og vóru í listaskálanum Oynni og á Fornminnissavninum. Í Vági sluppu tey eisini ein túr við Johonnu. Mánadagin var so samstarvsfundurin og tá vóru tey eisini rundferð í allari Suðuroy. Í gjáramorgunin fóru tey aftur til Havnar, har tey vóru í landsstýrinum, í Listaskálanum, á rækjuvirkinum á Oyri og á Oilwind, áðrenn tey fóru aftur til Danmarkar í gjárkvøldið.

# Fer at arbeiða fyri at tryggja at allir partar verða nøgdir

**Hergeir Nielsen fer nú fer at arbeiða fyri at tryggja, at andstøðan fær størri rætt at koma til orðanna í løgtinginum**

SAMSTARV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hergeir Nielsen, fyrsti næstformaður í Føroya Løgtingi, fer nú at kanna eftir, hvussu tað kann tryggjast, at andstøðan fær størri rætt at koma til orðanna í Føroya Løgtingi.

Tað er eitt, hann hevur fingið burturúr vitjanini hjá formansskapinum í danska fólkatinginum í Føroyum hesar seinastu dagarnar.

Hergeir Nielsen segði í Sosialinum í gjár, at nú formansskapurin í fólkatinginum er í Føroyum, ætlaði hann sær at taka tað upp, sum fór fram í løgtinginum, tá ið yvirtøkulógirnar og uttanríkispolitisku heimildarlógirnar vóru til viðgerðar.

Tá skuldsetti andstøðan samgonguna fyri at skrumbla málini ígjøgnum uttan at geva teimum ta nágreiniligu viðgerð, sum slík mál máttu fáa. Andstøðan fýltist eisini á, at hon ikki slapp at kalla teir serfrøðingar í uttanlandsnevndina, sum hon helt, kundi geva eitt íkast í royndunum at lýsa málið til fulnar.

Hergeir Nielsen segði, at hann ætlaði at spyrja formansskapin í danska fólkatinginum, um slíkt kundi komið fyri í Danmark.



*Hergeir Nielsen ætlar nú at kanna eftir um reglur í fólkatinginum eisini eiga at galdfa á Føroya Løgtingi. Her eru Christian Mejdahl, vm, Hergeir Nielsen og Eva Mejdahl á vegnum í Sandvík seinnapartin mánadagin*

## Arbeiðir víðari

Málið fekk eisini umrøðu á fundinum, sum var ímillum formansskapin í løgtinginum og formansskapin í fólkatinginum í Suðuroy mánadagin og har fekk hann greitt frá síni ónøgd.

Men Hann fekk ikki spurt donsku starvsfelagarnar um slíkt kundi komið fyri í danska fólkatinginum, tí tíðin rann undan.

Men hann hevur fingið at vita, at fólkatingið hevur ymsar skipanir sum tryggja, at mál fáa eina slíka viðgerð, at allir partar eru nøgdir.

Tær reglur eru ikki í Føroyum og nú tað er frammi um at endurskoða tingskipanina, ætlar fyrsti næstformaður at kanna eftir, hvussu hesar skipanir virka og um tær eiga at verða settar í okkara tingskipan.